www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum




# Ítróttaskrivari

**Hevur ítróttur tín áhuga? og dugir tú at skriva? so ert tú kanska júst persónurin, sum vit sóknast eftir.**

Til ítróttaredaktión okkara søkja vit eftir ítróttarskrivara. Høvuðsuppgávan verður saman við ítróttaredaktørinum at røkja eitt av kjarnuøkjunum hjá Sosialinum. Sum miðil hevur Sosialurin í nógv ár havt eina oddastøðu innan føroyskan ítrótt. Bæði á pappíri og alneti. Og verður tað eisini tín uppgáva at halda fast um og menna hesa oddastøðu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving, royndir og førleikar annars til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Jákup Mørk á tlf. 341840 ella Jan Müller á tlf. 341831. Sjálvandi ber eisini til at senda teldupost til jakup@sosialurin.fo ella jan@sosialurin.fo

Umsóknarfreistin til starvið er **fríggjadagin 14. september**, og verður starvið sett sum skjótast eftir hetta. Umsóknin saman við viðkomandi skjølum skal sendast til:

Sosialurin
Jan Müller
Postsmoga 76
110 Tórshavn

*Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blaði. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.*

## At bera fram tekst, talu ella sjónarmið

Sjónleikarhúsið í Tórshavn bjóðar áhugaðum á skeið

Leygardagin **15. september 2007** ella
**22. september 2007** frá kl. 08:30 til 15:30
verður arbeitt í Sjónleikarhúsinum við upplestri, framløgu, uppliving, upptøku og eftirmeting.

Skeiðið vendir sær til tey, sum ynskja:
· at arbeiða við upplestri
· at gerast sjónlig/ koma í reyða stólin
· at royna upptøku í ljóðstudio
· at eftirmeta upptøku
· at brúka ein dag til raddarvenjing, lurtiroyndir og refleksión

Ábyrgdina av skeiðnum hava:
Gulla Øregaard, idéfólk og fyrilestrarhaldari
Jón McBirnie, ljóðserfrøðingur
Jytte Joensen, sjónleikari og raddarvenjari
Oddvá Nattestad, samskipari

Tilmeldingin verður gjørd við telduposti **oddva@email.fo** ella **telefon 311132** innan 7. sept. 2007.

Prísurin er 2.000 kr. fyri hvønn luttakara.
Serlig matarskrá er íroknað.

**Havnar Sjónleikarfelag**
**Sí heimasíðu www.hsjonleik.fo**

TEAM85

## HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?

**22 50 00**

TÍÐINDAVAKTIN
ALT VIKUSKIFTIÐ

VIVA



Vikuskiftisvaktin hjá

**SOSIALINUM & PORTALINUM**

er at hitta alt vikuskiftið á

**TELEFON 22 50 00**

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum

VIVA

# Verkfrøðingur

Søkt verður eftir verkfrøðingi ella líknandi til projekterings- og eftirlitsarbeiðið innan fyri rør-tekniskar installatiónir.

Umsøkjarin skal hava viðkomandi útbúgving innan verkfrøði ella líknandi.

Tað er umráðandi, at tann, ið settur verður, hevur góð samstarvsevnir, dugir at arbeiða miðvíst, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult.

Arbeitt verður við teldu forritum sum Word, Excel, MSProject, AutoCad/ABS og MagiCad.

Løn og setanartreytir vera samsvarandi útbúgving og royndum.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving og arbeiðsroyndir verður at senda okkum, innan 20. september 2007.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Árna Jakobsen tlf. 353521/233521.

TEAM85

**Pf. Sofus M. Jakobsen**
**Ráðgevandi verkfrøðingar F.R.I.**

J.H. Schrøtersgøta 22, Postmoga 344, FO-110 Tórshavn
**Tel (+298) 353522 Fax (+298) 310622**
**t-postur: smj@smj.fo**